## út at koyra

# Mótmæla BMW í Birmingham

Herfyri mótmæltu umleið 40.000 fólk í miðbýnum í Birmingham, at BMW hevur selt Rover. Tey óttaðust, at eini 8000 fólk í økinum fóru at gerast arbeiðsleys.

**Kelda: Motor Magasinet**



# Honda skerjir í Swindon

Honda hevur boðað frá, at teir fara at skerja framleiðsluna í enska ídnaðarbýnum, Swindon, niður í helvt. Orsøkin er tað hækkandi enska gjaldoyrað, sum ger tað torført at kappast.

**Kelda: Motor Magasinet**



# Nýggjur og størri Pajero

Í heyst kemur Mitsubishi Pajero í nýggjari útgávu. Bilurin verður størri við meira rundum linjpum – og sum ein tann fyrsti jeepurin, hevur hann sjálvberandi karrossarí.

**Kelda: FDM Motor**



*Í mai mánaða 1956 komu tríggir Mercedes 180 til Føroya. Poul Gaard Hansen fekk hendan myrkabláa. Hans Andreas Davidsen (Hassadi) fekk ein grønan og ein var reyður. Hetta vóru fyrstu Mercedes bilar í landinum og kostaðu 18.000 krónur.*

**Mynd: Poul Gaard Hansen**

# Mercedes var dóttir Eysturrískan Daimler umboðsmann

MAGNUS GUNNARSSON

Hóast stovnararnir av fyritøkunum Daimler og Benz mugu metast sum pionerar innan bilaídnaðin, er Mercedes verksmiðjan, Daimler-Benz, ein lutfalsliga nýggj fyritøka, ið varð stovnað í 1926, tá fyritøkurnar Daimler og Benz vórðu lagdar saman.

### Dóttir Daimler umboðsmannin í Eysturríki

Gottlieb Daimler (1934-1900) og Carl Benz (1844-1929), høvdu arbeitt hvør í sínum lag við gassmotorum, og báðir vóru klárir við benzinmotorum í 1883.

Gottlieb Daimler var góður handilsmaður og samskipari. Hann hevði størri áhuga í motorum enn bilum. Carl Benz var har afturímóti sannførdur um, at motorar og bilar skuldi framleiðast sum ein heild.

Hjá Daimler var úr at gera við aldarskiftið. Teir gjørdu persónbilar, bussar, jarnbreytarakfør og skipsmotorar. Søluumboðsmaður teirra í Eysturríki, stórhandilsmaðurin, Emil Jellinek, var vorðin áhugaður í motorítótti. Tá hann var við í eini kappkoyring í 1899, brúkti hann ikki sítt egna navn, men kallaði seg Mercedes, ið var navnið á dóttur hansara, sum tá var 11 ára gomlu.

Mercedes navnið vísti seg at bera eydnu við sær, og hann vann kappkoyringina. Avtala varð gjørd við Emil Jellinek um, at hann umframt Eysturríki, skuldi umboða Daimler bilarnar í Ungarn, Fraklandi, Belgia og USA. Í hesum londum fingu bilarnir navnið Mercedes.

Fyrsti Daimler bilur við Mercedesbúmerki var gjørdur í 1901.

Tað gekk eisini við rúkandi ferð hjá Benz fyritøkuni við nógvum ymiskum sniðum. Í 1899 vóru teir heimsins stórsti bilaframleiðari í harðari kapping við Daimler.

### Daimler og Benz samanlagdar

Bæði hjá Daimler og Benz vórðu royndir gjørdar við smáum skjóttgangandi dieselmotorum, og í 1924 kom fyrsta samstarv teirra millum við at menna ein dieselmotor til lastbilar og bussar. Um hesa tíðina merkist tann búskaparliga afturgongdin í heiminum, og tað gekk hart út yvir bilverksmiðjurnar.

Um tær skuldu kláráð seg var neyðugt at arbeiða saman, og í 1926 løgdu pionerfyritøkurnar Daimler og Benz saman til Daimler-Benz AG.

Fyritøkurnar fingu felags búmerki, Mercedes stjørnan í heiðurskransinum hjá Benz.

Daimler-Benz verksmiðjurnar í Stuttgart vóru bert ein toft, tá seinni heimsbardagi var av, og má tað metast sum eitt undur, at teir fingu framleiðsluna í gongd aftur við einum sniði, sum teir høvdu gjørt fyri kríggið.

Fyrr, eins og nú, vóru Mercedes-Benz mest kendir fyri at gera stórar prestisjubilar, men fíggjarkreppan í tríatiárunum hevði við sær, at teir eisini fóru at framleiða minni og bíligari bilar sum Mercedes 170, ið kom á marknaðin í 1936.

Tað var hesin bilurin, ið kom aftur í framleiðslu eftir kríggið. Týski búskapurin batnaði so líðandi, og í 1953 varð ein nýggjur Mercedes 180 vístur á bilaframsýningini í París. Síðani hevur tað bert gingið framá við stórum úrvali av persónbilum, vørubilum lastbilum og bussum.

Mercedes bilarnir eru kendir fyri góðsku og slitstyrki og verða nógv brúktir sum hýruvognar, hóast teir eru 2 til 3 ferðir dýrari enn tilsvarandi bilar í somu støðd.

Daimler-Benz var fyrsta bilverksmiðjan, sum av sínum eintingum arbeiddi við at gera bilarnar ferðslutryggar – langt áðrenn talan var um lógaráseting á tí øki-



*Gunnar Hansen (1914-1968). Umframt at vera heilsølumaður, seldi hann eisini knallertir, motorsúkklur og bilmerkini DKW, NSU og Mercedes-Benz*




*Hendan lýsingin er frá 1955 – og hon er ein av teim fyrstu hjá Gunnari Hansen*




*Tá fyritøkurnar vórðu samanlagdar fingu tær felags búmerki, Mercedes stjørnan fekk heiðurskransin hjá Benz*



## út at koyra

# Bilframsýningin 2000 í høllini á Hálsi

Bilframsýningar er ikki nakað nýtt fyribrygdi. Heilt frá fyrst í 20. øld, hava bilaframsýningar verið, har bilaframleiðarar hava sýnt tey nýggjastu bilmodellini fram.

Seinnu árini hevur hetta ført til eina rættuliga kapping millum bilverksmiðjurnar, sum gera alt fyri at fáa tey nýggjastu bilmodellini til tær stóru altjóða bilaframsýningarnar í Geneve, Frankfurt, Detroit ella Tokio. Har hava bilaverksmiðjurnar eisini eitt boð uppá framtíðina, við framsýningarbilum við øllum tí nýggjasta, eisini tað sum enn ikki er sett í framleiðslu. À hesum framsýningum fáa tey at vita, hvat kundarnir halda um tey nýggju hugskotini.

### Bilaframsýning verður aftur næsta ár

Her hjá okkum eru bilafarmsýningarnar ikki so gamlar, tær komu eftir at ítróttar og samkomuhøllirnar vórðu bygdar runt um í landinum. Hjá teimum sum hugsa um at keypa bil, er tað eitt gott høvi, har tey kunnu vitja teir ymsu básarnar, og fleiri bilhandlarar eru savnaðir á einum stað.

Bilframsýningin 2000 í høllini á Hálsi, ið hondbóltsfeløgini Neistin og Kyndil skipaðu fyri, var ein stór og væl fyriskipað framsýning, har nógv fólk vitjaðu.

Umframt bilhandlararnar vóru tey, sum selja eykalutir, prutl, motorsúkklur, biltryggingar og bilfígging. Eisini høvdu framsýnararnir fingið fleiri av teimum allarnýggjastu bilunum við, eisini sermerktar bilar sum vit annars bert kunnu lesa um í bilbløðunum.

Ein av fyrireikarunum, Birgir Sondum, sigur, at ein bilaframsýning verður aftur um eitt ár, og at hondbóltsfeløgini í framtíðini ætla at gera meira burturúr, við t. d. at skipa fyri fleiri tiltøkum, meðan framsýningin er.



*Sum ein avleiðing av, at Daimler Benz og Chrysler hava lagt saman, umboðar bilasølan hjá Ivan Johansen nú eisini Jeep, sum hoyra til Chrysler. Her er ein Jeep Grand Cheroke*

**Mynd: Birgir Sondum**



*Sportbilar eru nakað, sum dregur fólk til eina bilaframsýning. Toyota MR-2 í nýggjastu útgávu við galesju, sum uppá fá sekund kann leggjast saman.*



*Ein av nýggjheitunum á framsýningini var Nissan Almera, sum júst nú er komin á marknaðin í heilt nýggjari útgávu.*

**Mynd: Birgir Sondum**



# Rendi á garðin

Ein bilur, sum kom koyrandi oman eftir Frælsinum í Havn mikukvøldið, skramblaði knappliga saman, tí upphangini gingu fyri.

Førarin misti tamarhaldið á bilinum, sum rendi inn í ein garð, sum menn eru í ferð við at laða. Bilurin fór í knús, men mansskaði var tíbetur eingin.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**